# Vágbingar alla orsøk til at gráta

**– Vit eru ómetaliga kedd í Vági og nú vænti eg at tað verður ógvuliga torført at fáa vágbingar at góðtaka eina kommunusamanlegging, sigur Hans Joensen, býráðslimur**



*– Vágs Kommuna er slættað við jørðina, men tað er beinleiðis ósatt, at vit eru ímóti at byggja røktarheim í Vági, sigur Hans Joensen, býráðslimur í Vági. Men hann heldur, at eitt røktarheim skal ikki byggjast vesturi á Eiðinum, men á Marknoyri, sum er sett av til eldraøki*

SKÚLADEPIL OG ELLISHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ein sorgarstøða í Vági.

Hans Joensen, býráðslimur í Vági, sigur, at vágbingar eru ómetaliga keddir, eftir at Løgtingið gjørdi av at flyta miðnámsskúlan úr Vági og leggja hann í Hovi.

Sjálvur var hann av ítarastu undangongumonnum fyri at varðveita skúlan í Vági.

– Einastu amennu arbeiðspláss vit høvdu í Vági, var skúlin, men nú eru tey eisini flutt.

Hans Joensen vísir á, at hesi seinsastu 15 árini eru ein hópur av almennum arbeiðsplássum fluttúr Vági.

Hann nevnir Strandferðsluna, sum gav Vágs Kommunu 500.000 krónur í inntøku um árið. Hann nevnir eisini Toll- og Skatt, Almannastovuna og sýsluskrivstovuna, sum alt er flutt á Tvøroyri. Og nú seinast eru eisini vardu íbúðirnar í Vági afturlætnar.

Harafturat kom ætlaða frímerkjadeildin heldur ikki til Vágs.

– Vágbingar hava alla orsøk til at gráta, sigur Hans Joensen.

### Slættað við jørðina

Í eini seinastu roynd at varðveita skúlan í Vági, samtykti ein meiriluti í Vágs Býráð at fara undir samráðingar um at leggja alla oynna í eina kommunu. Hetta var eitt stórt stig hjáVágs Býráði, tí higartil hevur tað ikki vilja hoyrt talan um eina kommunu í Suðuroy. Men treytin var eisini, at skúlin varð bygdur í Vági.

Nú skúlin er fluttur, veit Hans Joensen ikki, hvussu verður vorðið við samanlegging.

Hann leggur dent á, at sjálvur hevur hann ikki tikið støðu til spurningin um samanlegging. – Men eg dugi at síggja, at í løtuni er grundarlagið hjáVágs Kommunu at leggja saman við øðrum kommunum, ómetaliga veikt. Eg ivist eisini stórliga í, um vágbingar høvdu atkvøtt fyri eini samanlegging, soleiðis sum støðan er nú, heldur býráðslimurin.

Høvdu vit fingið skúlan í Vági, kundu vit samráðst um samanlegging á nøkunlunda jøvnum føti við hinar kommunurnar, tí so stóðu báðir partar. Nú liggur annar parturin slættaður við jørðina og tað kann neyvan nakað gott spyrjast burturúr.

Annars staðfesti seinasta samtyktin í Vágs Býráði, at verður skúlin ikki bygdur í Vági, dettur eisini tilboðið um samanlegging, burtur.

### Røktarheim vælkomið

Hans Joensen vísir staðiliga aftur, at meirilutin í Vágs er ómóti at byggja røktarheim í Vági.

– Eg havi ongantíð havt nakað ímóti at eitt røktarheim verður bygt í Vági og tað haldi eg heldur ikki, at nakar annar hevur. Eitt røktarheim skal vera vælkomið í Vági og tað hevur býráðið eisini staðfest í eini samtykt um miðnámsskúlan.

– Men eg haldi framvegis, at tað var skeivt at offra skúlan afturfyri. Kundu vit varðveita skúlan afturfyri, góðtóku vit, at røktarheimið skuldi byggjast á Tvøroyri.

Hans Joensen sigur, at er ætlanin at byggja røktarheim í Vági, ivast hann ikki í, at býráðið fer at geva byggiloyvi til tað.

– Men eg fari at seta meg ímóti, at tað verður bygt vesturi á Eiðinum á stykkinum, sum var ætlað til skúlan. Eftir mínum tykki skal eitt røktarheim í Vági byggjast úti á Marknoyri á økinum, sum kommunan hevur lagt av til eldraøki.

– Í býarætlanini fyri Vág, er økið á Marknoyri sett av til eldraøkið og økið veturi á Vatninum sett av til skúlaog ítrótt.

Annars heldur Hans Joensen, at tað verður ikki uttan trupulleikar at seta eitt røktarheim á stovn í Suðuroy, tí her er onki útbúgvið fólk yvirhøvur til at átaka sær arbeiði á einum slíkum røktarheimi.

# Gamla kommunuskrivstovan takast niður

**Í summar hvørvur eitt sermerkt hús úr býarmyndini í Vági**

BÝARMYND

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal gamla kommunuskrivstovan í Vági takast niður.

Tað hevur Vágs Býráð samtykt á býráðsfundi nakað síðani.

Húsið er í avbera ringum standi og tað stendur at detta niður.

À býráðsfundinum upplýsti Dánjal Bjarkhamar, formaður í teknisku nevnd, at ein byggikønur hevur kannað húsini og hann er komin til ta niðurstøðu, at tey eru kavrotin og í so vánaligum standi, at tað eru óráð at gera tey ístand.

Tí eru einastu ráðini at taka tey niður.

Býráðið hevur kortini í huga, at musikkskúlin brúkar húsini og somuleiðis hevur miðnámsskúlin bøkur í húsinum.

Arbeitt verður nú við at finna aðrar loysnir fyri tí, men Dánjal Bjarkhamar sigur, at endamálið er at fáa húsini tikin niður nú í summar.

Eitt eyðkenni við húsinum er tann málaði rúturin oman ímóti vegnum. Tað er ein málningur, sum listamálarin, William Smith, málaði og Dánjal Bjarkhamar sigur, at ætlanin er at taka hann úr og at varðveita hann.



*Gamla kommunuskrivstovan í Vági er ikki nakað prýði fyri býin. Húsið stendur at rapa og nú verður tað tikið niður*